**Fra:** Sjúrður Rasmussen
**Sendt:** 29. marts 2019 10:13
**Til:** Rannvá Sólheim <rannvas@logting.fo>
**Cc:** mrcc@mrcc.fo; FMA <fma@fma.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>
**Emne:** Kunning til uttanlandsnevndina av seinkaðum ummæli frá Landsverki av løgtingslógaruppskoti um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki og løgtingslógaruppskot um reglur um sjóuppmerking

**Fra:** Armgarð Steinhólm <ArSt@lv.fo>
**Sendt:** 28. marts 2019 21:14
**Til:** Sjúrður Rasmussen <sjr@lms.fo>
**Emne:** VS: Áheitan um ummæli av løgtingslógaruppskoti um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki og løgtingslógaruppskot um reglur um sjóuppmerking

Góðan dag

Hervið okkara viðmerkingar til løgtingslógaruppskotið og viðheftu notatini. Tíverri er hetta skrivið dottið niðurímillum her hjá okkum, so tað er ikki sent ræofficeundis.

Yvirskipað hava vit tó ikki nakra viðmerking til sjálva lógina, men nakrar viðmerkingar til, hvussu málsøkið og samskiftið verður umsitið frameftir.

Viðmerkingar frá Landsverki.

- Yvirskipað má tað vera ein myndugleiki við nautiskum serkunnleika. Hesin myndugleiki ella fyrisiting skal kunna geva loyvir og ráðgeva viðvíkjandi avmerking, umframt at vera myndugleiki fyri vitarnar. Bæði fyri teir vitarnar, sum hoyra til stat, kommunur og Landsverk í dag.
- Hendan nautiska fyrisitingin skal eisini umsita fráboðanir, málsviðgera og senda út "efterretninger for søfarende" (EFS), sambært altjóða krøvum (SOLAS).
- Vit kunnu leggja afturat, at yvirtøkan av kortøkinum, herundir eisini sjókortum, sum Umhvørvisstovan fyrireikar í løtuni, hevur onkur markamót til vitar, avmerking og "efterretninger" (EFS).
- Ein uppgáva hjá Landsverki er at vera hoyringarpartur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ísv málsviðgerð av alilógini – herundir samskifti við Søfartstyrelssen um EFS. Hvussu verður við hesum, verður tað so Sjóvinnustýrið, ið samskifir við HFS?
- Eitt annað, sum stendur ógreitt er dálkingarvandar ísv skipsvrak í sjónum. Vit duga ikki at síggja at hesi viðurskifti eru tikin við í metingunum hjá Søfartsstyrelsen.

VINALIGA // REGARDS

**ARMGARÐ STEINHÓLM**
Deildarleiðari, Infrakervi // Head of Division, Infrastructure

+298 290 891 // www.landsverk.fo

LANDSVERK

